

www.oljan.fo

**Jan Müller** 11 - 02 - 2013

# Oljuleitiloyvini settu met í 2012

Í 2012 komu 16,6 mió. kr. í landskassan fyri víddargjøld frá oljuloyvum sigur Jarðfeingi frá. Tað er ymist, hvussu sjónligt tað oljuvirksemi, ið hevur tilknýti til føroyska landgrunnin, er á landi og í búskapinum t.d. er borivirksemið eygsýnt. Eisini sæst nakað av avleiddum virksemi á landi, tá seismiskt virksemi er á landgrunninum. Men tað eru eisini aðrir tættir í samband við leitivirksemið, ið geva fíggjarligt avkast til landskassan. Ein teirra eru víddargjøld. Tá oljufeløg fáa tillutað leitiloyvi, er ásett í loyvunum, hvat øki talan er um, herundir víddin á loyvisøkinum. Fyri økið skal rindast eitt víddargjald. Tey fyrstu seks árini av loyvistíðini er árliga gjaldið 500 kr./km² og hækkar síðani árliga, til tað eftir 16 árum er 35.000 kr./km². Í 2012 var inntøka landskassans frá víddargjøldum 16,6 mió. kr., og er hetta hægsta inntøka , síðan fyrstu loyvini vórðu latin í 2000. Tey seinastu 7 árini hava inntøkur landskassans frá víddargjøldum tilsamans verið góðar 80 mió. kr. 2006 2007 2008 2009 2010 2011 2012 Tilsamans Víddar gjøld mió. kr. 7,1 8,7 10,7 11,3 11,9 14,1 16,6 80,5 Hvussu hesar inntøkur verða frameftir er tengt at, hvussu leitivirksemið fer at hátta seg skrivar Jarðfeingi á síni heimasíðu. Mynd Kaj Leo Johannesen, løgmaður, Johan Dahl, oljumálaráðharri her saman við Rúna M. Hansen, Statoilstjóra umborð á Cosl Pioneer.